FØROYA LANDSSTÝRI

23369 16 DEC. 1985

3800 Tórshavn, 11. desember 1985

Tlf. 1 1080 . Telex 81235 tingns fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10-15, leygardag stongt

F. L. j. nr. 2204-14-6
(at tilskila í svari)

IC/MSP

Soljóðandi skriv er í dag sent Eiðis Fornminnisfelag, 3834 Eiði:

"Í skrivi til landsantikvarin dagfest 9. september 1984 hevur Eiðis Fornminnisfelag søkt um góðkenning av Eiðis bygdasavni, ið varð stovnað á eykaaðalfundi hjá felagnum 8. september 1984, sum stuðulssøkjandi stovn eftir løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentannarsøguligum virksemi.

Eisini hevur felagið sent landsantikvarinum avrit av úrriti úr fundarbók felagsins viðvíkjandi umrødda eykaaðalfundi, har tað samtykta uppskotið til viðtøkur fyri Eiðis bygdasavn er tilskilað.

Í hesum úrriti eru viðtøkurnar orðaðar soleiðis:

"§ 1.

Eiðis Fornminnisfelag setir á stovn sjálvsognarstovnin Eiðis Bygdasavn.

§ 2.

Endamál stovnsins er í Eiðis kommunu

<u>at</u> fremja varðveitingararbeiði Eiðis Fornminnisfelags av fornminnum og forngripum,

<u>at</u> savna forngripir, merkja og skráseta teir við øllum upplýsingum, sum møguligt er at fáa til vega og

<u>at</u> seta upp siðsøguliga framsýning.

§ 3.

Savnið verður stýrt av nevnd Eiðis Fornminnisfelags.

Nevndin stendur aðalfundi Eiðis Fornminnisfelags til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

Roknskaparárið er álmanakkaárið.

§ 4.

Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir § 3, 3. stk. í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentannarsøguligum virksemi."

Landsantikvarurin hevur sent landsstýrinum málið til støðutakan og samsvarandi tilmæli hansara hevur landsstýrið samtykt at góðkenna Eiðis bygdasavn sum stuðulssøkjandi stovn og viðtøkur savnsins eftir § 2. í bygdasavnslógini, tó við teirri treyt fyri studningsveitan sambært § 4 í somu lóg, at Eiðis bygdasavn yvirtekur Látrahúsini at nýta sum savnsbygning.

Vísandi til hetta verður felagið biðið um at skipa fyri, at eitt reinskrivað eintak av viðtøkunum fyri Eiðis bygdasavn, dagfest og undirskrivað av nevndarlimunum í Eiðis Fornminnisfelag, verður sent landsstýrinum til áteckningar um góðkenning landsstýrisins saman við einum tinglisnum skjali, sum vísir, at Eiðis bygdasavn er eigari av Látrahúsunum.

Vísandi til at tað í § 3 í uppskotinum til viðtøkur fyri bygdasavnið er ásett, at savnið verður stýrt av nevnd Eiðis Fornminnisfelags, verður felagið eisini biðið um at senda landsstýrinum eitt eintak av viðtøkunum fyri Eiðis Fornminnisfelag.

Av tí at Eiðis bygdasavn í skjølunum til fíggjarløgtingslógina 1985 er nevnt millum tey bygdasøvn, ið væntandi fáa lógarbundnan studning í hesum fíggjarári, og vegna tess at studningsveitanin til bygdasavnið er treytað av framman fyri umrødda ognarskifti, og at avgreiðslan av málinum um góðkenning er seinkað her, skal verða sagt frá, at um viðtøkur og framman fyri nevnda tinglisna ognarskjal verða send landsstýrinum skjótast gjørligt og <u>í seinasta lagi 1. februar 1986</u>, og ársroknskapur 1985 o.a. sambært § 3 í bygdasavnslógini samstundis verður sent landsantikvarinum, fer bygdasavnið, treytað av átekning á viðtøkurnar um góðkenning landsstýrisins, at kunna fáa studning til raksturin og til keypið av savnsbygninginum sambært § 4 í bygdasavnslógini rindaðan av fíggjarløgtingslógini 1985 fyri roknskaparár savnsins 1985.

Viðvíkjandi teirri samtykt, sum er tilskilað í framman fyri umrødda úrriti frá eykaaðalfundi felagsins 8. september 1984 um "fíggjarætlan fyri komandi ár", skal verða sagt frá, at tann samtyktin ikki er í samsvari við § 4, 3. stk. í bygdasavnslógini.

Viðvíkjandi hesum og frágreiðingini í skrivi Fornminnis-felagsins dagfest 9. september 1984 um útreiðslur til keyp av einum parti av og til umvæling av Látrahúsunum og viðvíkjandi umsókniní um studning til hesar útreiðslur, heruppií studning til útreiðslur, sum longu tá vóru goldnar, vísir landsstýrið til tað, sum frammanfyri er tilskilað um ta formligu góðkenningina av viðtøkunum og innsendan av ársroknskapi 1985 sum fyritreyt fyri rindan av studningi til rakstur og til keyp av savnshúsunum í roknskaparári savnsins 1985. Eitt eintak av bygdarsavnslógini
./. verður sent hjálagt."

Sagt verður frá hesum vísandi til tilmæli savnsins í skrivi dagfest 26. september 1984 og seinni telefonsamrøðu um málið.

L.v.

[signature]

Føroya Fornminnissavn
Debesartrøð
3800 Tórshavn